**Góðu svimjarar, viðhaldsfólk og fyriskiparar**

Sum løgmaður og verji fyri ítróttina er tað mær ein heiður at seta FM meistarastevnuna á stuttgeil 2017. Komandi dagarnar fara okkara evnaríku ungu svimjarar at kýta seg og geva alt, ið tey eiga. Kappingin er hørð, og vónin er stór um at røkka kravtíðini til Oyggjaleikirnar í Gotlandi í summar.

Føroysk svimjing hevur seinastu mongu árini tikið risa fet framá. Vit síggja ferð eftir ferð, at tað at røkka stórum úrslitum ikki er ein spurningur, um hvussu stór tjóðin er. Tað er fyrst og fremst ein spurningur um hugburðin hjá einstaka ítróttarfólkinum. Tað hava tit svimjarar prógvað ferð eftir ferð. At gerast ein góður svimjari krevur harða venjing dag og dagliga, góðan sjálvsaga, treiskni, treysti og ikki minst hug og vilja. Eg havi størstu virðing fyri allari tí orku og øllum tí arbeiði, tit leggja í tykkara ítróttagrein og fyri teimum flottu úrslitum, tit røkka.

Tit eru ein fyrimynd fyri okkara ungdóm – okkum øll. Tí við rætta hugburði og hørðum arbeiði kunnu øll mál røkkast – ikki bara ítrótti, men í øllum lívsins viðurskiftum.

Komandi dagarnar fara í alt 73 svimjarar úr 6 feløgum at kappast tilsamans í 42 kappingum. Her í høllini og frammanfyri sjónvarpsskíggjanum heima við hús fara vit øll at fylgja spent við. Spennandi verður, um okkurt nýtt met verður sett aftur í ár, og vónandi røkka enn fleiri svimjarar kravtíðini til Oyggjaleikirnar.

Eg fari at enda at ynskja øllum nakrar góðar meistarastevnudagar og tykkum svimjarum bestu eydnu!

Við hesum orðum er FM meistarastevnan á stuttgeil 2017 sett, takk fyri!